# Tað gongur strálandi hjá TeleTech

**Samskiftisfyritøkan, TeleTech, hevði eina framgongd í fjør uppá heili 27%**

SAMSKIFTI
*Vilmund Jacobsen*




*Í juli 2002 keypti TeleTech sítt høvuðssæti í J. C. Svabosgøtu. Ein stórur partur av bygninginum verður leigaður út. - Kappingin millum okkum, Føroya Tele og Kall er hørð, men tað eru bara vit, sum leggja dent á tað tráðleysa internetið, sigur Birgir W. Høgnesen*

At tað gongur væl hjá samskiftisfyritøkuni, TeleTech, kann valla nakar ivi vera um.

- Hóast roknskapúrslitið hjá felagnum enn ikki er uppgjørt, er greitt, at kundagrundarlagið øktist ár 2002 við útvið 30%.

Hetta veit Birgir W. Høgnesen, sum starvast hjá fyritøkuni, at siga.

Hóast TeleTech gjørdi stórar íløgur í útbygging í farna ári, vóru hesar viðvirkandi til, at inntøkurnar hjá felagnum vuksu munandi.

Birgir sigur, at kundagrundarlagið hjá TeleTech til tráðleysa internetið røkkur í dag Tórshavn, Nólsoy, Toftir, Runavík, Saltangará, Strendur, Skála, Syðrugøtu, Norðragøtu, Gøtugjógv, Leirvík og Klaksvík.

- Útbyggingin gongur skjótt, og TeleTech ætlar sær at røkka meginpartin av landinum við komandi útbyggingum av egnum neti.

Tað, at felagið byggir sítt egna net, sigur Birgir, ger, at viðskiftafólk hjá TeleTech hava eitt sjálvstøðugt og trygt net.

Hann vísir á, at TeleTech var ikki burtur, tá ið Cantatkaðalin í 2002 var skaddur, tí felagið hevði eina góða avtalu um uttanlandslinju.

### Stór øking

Birgir sigur, at ein útbygging hevur tað við sær, at økini, har útbygt verður, fáa eina betri atgongd til tráðleysa internetið hjá TeleTech.

- Hesum gjørdu nógv sær dælt av, tí talið av viðskiftafólki hjá TeleTech øktist við næstan 30% úr ár 2001 til 2002.

Hann vísir á, at seint í ár 2002 gjørdi TeleTech avtalu við ein av mest seljandi telduhandlunum í Norðoyggjum, Omega, um at selja internet hjá felagnum.

- So, her vænta vit framgongd í 2003, leggur Birgir aftrat.

Herfyri gjørdu TeleTech og Kall avtalu um, at Kall leigar seg inn í hús og mastur á Høganesi í Nes kommunu.

- Í løtuni eru vit eisini í samráðingum við nøkur øki í landinum um komandi útbyggingarnar hjá okkum, sigur hann.

### Stórir møguleikar

Við veksandi talinum av viðskiftafólki, hevur TeleTech eisini gørt sær nakrar tankar um hvørja leið, felagið eigur at ganga í framtíðini.

Birgir sigur, at nógvir møguleikar eru í loyvinum, ið TeleTech, sum tað fyrsta felagið, fekk frá táverandi landsstýrismanninum í fjarskiftismálum, Finnboga Arge í 1999 .

- Eg vil ikki koma nærri inn á, hvat felagið hugsar um, sigur Birgir.

Spurdur, um fartelefon ella fastnet eru í kvittanini, sigur hann, at tað vil hann ikki koma nærri inn á, fyrr enn kanningarnar, sum skulu gerast, eru lidnar.

Birgir sigur tó, at TeleTech ætlar sær ikki inn í satelittinternet, tí tær royndirnar, felagið gjørdi uttanlands í fjør, vóru vit ikki nøktandi.

### Positiv gongd

Í juli 2002 keypti TeleTech sítt høvuðssæti í J. C. Svabosgøtu, og í komandi tíðum er so ætlanin, at aðrar íløgur skulu gerast í tekniska útgerð. Felagið hevur eisini nýtt nakað av peningi til FarIce-kaðalin, sum væntandi verður klárur í desember í ár.

Birgir roknar ikki við, at allar hesar íløgur fara at tyngja um raksturin, tí húsaognin hjá TeleTech er í stóran mun útleigað.

- Hetta saman við vaksandi talinum av viðskiftafólki sigur okkum, at gongdin er ógvuliga positiv, sigur hann

Spurdur, sigur Birgir, at hann metir tað vera náttúrligt, at kappingin er hørð millum Føroya Tele, Kall og TeleTech.

- Men tað eru bara vit av okkum trimum, sum leggja dent á tað tráðleysa internetið í løtuni, og tí eru vónirnar hjá okkum góðar, leggur hann aftrat.

### Bert 16 oyru

Birgir W. Høgnesen sigur, at TeleTech er inni í eini positivari gongd, sum hann tekur til.

- Prísurin hjá okkum á lokala netinum er bara 16 oyru.

Viðskiftafólkini hugsa sjálvsagt eisini um prísin, men eg ivist ikki í, at tey hugsa mest um, at tey hava eitt internet, sum stendur opið allan dagin – eitt internet, sum ikki skal ringjast upp, tá ið farast skal á netið, sigur hann at enda.



*- Eg trúgvi, at viðskiftafólk okkara hugsa mest um, at tey hava eitt internet, sum stendur opið allan dagin – eitt internet, sum ikki skal ringjast upp, tá ið farast skal á netið, sigur Birgir W. Høgnesen, sum starvast hjá samskiftisfyritøkuni, TeleTech*

# Tombola og eydnuhjól í Stranda skúla

TILTØK
*Vilmund Jacobsen*

**Strendur:** Í dag, leygardagin, 15. mars, skipar Stranda Ítróttarfelag fyri tombola og eydnuhjóli í Stranda skúla.

Tombola byrjar klokkan 19, og eydnuhjólið fer at "snurra" hálvan tíma seinni, klokkan 19.30.

Hetta er eitt afturvendandi tiltak, sum St.Í.F. skipar fyri um hesa tíðina á hvørjum ári.

Tiltakið plagar at eydnast væl, og soleiðis vóna stigtakararnir eisini, at tað verður í dag.

Tað eru í fyrsta lagi íðkandi og hvílandi limir, sum lata gávur til eydnuhjólið, og onkur fyritøka plagar eisini at vera beinasom og lata onkran lutin.

Nógv fólk plaga at leita sær í Stranda skúla eitt slíkt kvøld, og úrtøkan hjá felagnum hevur hini árini verið góð, einar 50.000-60.000 krónur hvørja ferð.

Allur peningurin, sum kemur inn, fer til raksturin av St.Í.F, og er eitt kærkomið íkast.

Í hesum kappingarárinum fylti St.Í.F. seksti ár, og tí vónar felagið, at undirtøkan í ár ikki verið minni, men kanska uppaftur størri, enn undanfarin ár.

Eitt væl stuðlað kvøld í kvøld hevði verið ein góð føðingardagsgáva, nú felagið er farið um tey seksti.

Høvuðsvinningarnir hesaferð eru 1. X–box við 2 joystickum+1 spæl og 2. fartelefonir.

Stranda Ítróttarfelag ynskir at takka øllum hjartaliga, sum vilja stuðla felagnum í Stranda skúla í kvøld.



# Støðan skal gerast upp

**Løgmaður hevur ongar ætlanir um at loysa Høgna Hoydal úr starvi ella gera meira við setanina av Steffen Stummann Hansen, hóast hann er rúkandi ósamdur. Ì samgonguni má støðan nú gerast upp, og løgmaður ótolnast eftir svari frá Tjóðveldisflokkinum**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*



Løgmaður er farin at ótolnast.

Hann er farin at ótolnast eftir einari útmelding frá Tjóðveldisflokkinum um støðuna í samgonguni. Men eisini løgmaður vil hava eina greiða støðu.

– Føroya fólk hevur ikki uppiborið framhaldandi at vera vitni til, at vit ikki finna útav tí. Tí haldi eg, at vit mugu gera støðuna upp og finna útav, um vit kunnu fáa annað lag á ella ikki, sigur Anfinn Kallsberg.

Tjóðveldisflokkurin er farin undir gjølla at umhugsa støðuna í samgonguni, eftir at Annlis Bjarkhamar varð søgd úr starvi sum landsstýrismaður. Formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, sigur, at málið um Annlis og setanina av landsantikvari er bert tað seinasta málið av nógvum, sum gera, at flokkurin hevur brúk fyri gjølla at umhugsa støðuna.

Løgmaður koyrdi Annlis Bjarkhamar úr starvi fyri at staðfesta setanina av Steffen Stummann Hansen sum landsantikvari, men nú Høgni Hoydal hevur staðfest, at rætt er farið fram, so ætlar løgmaður einki meira at gera við málið, hóast hann er rúkandi ósamdur. Høgni Hoydal skal ikki vænta sær at verða koyrdur úr starvi sum mentamálaráðharri.

– Tað er ein stórur munur á støðuni hjá Annlis og Høgna. Annlis handlaði allatíðina beint ímóti tí, sum eg helt vera skilagott. Hon staðfesti eisini eina setan dagin áðrenn, at eg hevði fingið skjølini í málinum og langt aftaná, at eg boðaði frá, at eg fór at kanna málið.

Hon hevur so tikið eina fyrisitingarliga avgerð, sum hon hevði rætt til at taka, og nú er málið heilt øðrvísi við einum triðja persóni – nevnliga tann nýggja landsantikvarin, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður.

Hann sigur, at tað fer at kosta millum 2,5 og 3 milliónir ella meira at broyta fyrisitingarligu avgerðina og siga Steffen Stummann Hansen úr starvi, tá hann hevur fingið ein sáttmála fyri fimm ár, har eingin royndartíð er ásett.

Og løgmaður ætlar ikki at gera meira við sjálva setanina. Hann leggur dent á, at hann er púra ósamdur við niðurstøðuna hjá Høgna Hoydal um, at alt er farið rætt fram.

– Eg havi viðgjørt málið, og eg eri sannførdur um, at málið ikki er avgreitt á fullgóðan hátt. Men tann støðan er nú farin, og fyrisitingarligi myndugleikin er nú hjá sitandi landsstýrismanni, og løgmaður fær ikki gjørt meira við tann fyrisitingarliga partin, sigur Anfinn Kallsberg.

Løgmaður hevur altíð møguleikan at loysa landsstýrismenn úr starvi, men tað er ógvuliga lítið sannlíkt, at løgmaður fer at taka hetta stigið móti sitandi mentamálaráðharranum.

Spurdur, um hetta ikki er eitt misálit á løgmann, tá Høgni Hoydal kemur til øvugtu niðurstøðuna enn løgmaður, sigur løgmaður, at hetta er ein meting, sum Høgni Hoydal má gera.

– Eg meti, at avgerðin hjá Høgna Hoydal er tikin útfrá einum politiskum atliti meira enn fyrisitingarligum atliti, sigur Anfinn Kallsberg.

### Støðan gerast upp

Løgmaður ger eisini greitt, at hann ikki ynskir, at hetta stevið í samgonguni heldur fram.

– Tað er nú komið hartil, at fáa vit ikki annað lag á, so er hesari samgonguni ikki lív lagað, sigur Anfinn Kallsberg.

Hann er farin at ótolnast eftir svari frá frá Tjóðveldisflokkinum, sum nú hevur umhugsað støðuna í longri tíð. Men løgmaður ynskir eisini, at partarnir seta seg niður og finna eina loysn á trupulleikanum. Hetta hevur løgmaður fráboðað Høgna Hoydal.

– Nú mugu vit fara at fáast við politikk aftur, sigur løgmaður at enda.

# Petur og Annlis púra ósamd

**Annlis Bjarkhamar og Petur Petersen vóru í flest allar mátar ósamd í sambandi við setanina av nýggjum landsantikvari**

FYRISITING
*Heri á Rógvi*



*Aðalstjórin og landsstýrismaðurin vóru púra ósamd um avgerðina at seta landsantikvar. Samskifti teirra millum í hesum málinum fór til síðst fram umvegis teldupost.*

Tað er kanska ikki so galið hjá teimum báðum Annlis Bjarkhamar og Peturi Petersen ikki at skulu hittast til arbeiðis hvønn morgun.

Í málinum viðvíkjandi setanini av nýggjum landsantikvari vóru tey bæði so rúkandi ósamd. So mikið ósamd, at Petur Petersen kendi seg noyddan til at gera Anfinn Kallsberg vart við hetta.

Sosialurin hevur fingið innlit í skjølini í sambandi við viðgerðina hjá løgmanni av nógv umrødda málinum um landsantikvar setanina.

Sum heild er lítið nýtt at finna í skjølunum, tí alt tað, ið ikki hevur verið væl og virðiliga frammi í fjølmiðlunum.

Men skjølini siga eina søgu um, hvussu ósamd Annlis Bjarkhamar, fyrrverandi landsstýrismaður, og Petur Petersen, aðalstjóri í Mentamálaráðnum, hava verið.

Òsemjan sæst fyrst, tá Annlis Bjarkhamar boðar frá, at hon ikki ætlar at fylgja báðum tilmælunum frá setanarnevndini – at seta Símun V. Arge í starv sum landsantikvar – men heldur fer at seta Steffen Stummann Hansen í starv.

Tað framgongur av skjølunum, vit hava fingið innlit í, at aðalstjórin mælir Annlis Bjarkhamar frá at taka hesa avgerð, men hon tvíheldur um sína støðu – og Steffen Stummann Hansen verður settur í starv.

Tá løgmaður so seinni biðjur um eina frágreiðing, so fer Annlis Bjarkhamar nakað illa við Peturi Petersen og hinum – í øllum førum eftir teirra tykki – og Petur Petersen sendir løgmanni sína egnu frágreiðing, har hann vísur á, at hann er púra ósamdur við Annlis Bjarkhamar.

Petur Petersen metir, at tað er skeivt, tá Annlis Bjarkhamar rør framundir, at setanarnevndin ikki hevur gjørt eitt nóg gott og ósakligt arbeiði.

Eisini vil hann vera við, at Annlis Bjarkhamar hevur hótt við at siga hann úr starvi, skrivaði hann ikki undir brævið til Magistarafelagið, ið Annlis Bjarkhamar sendi, eftir at málið var komið alment fram.

Hesum noktar Annlis Bjarkhamar í einum nýggjum skrivi til løgmann fyri.

Tað er ógvuliga ilt hjá okkum at skriva greitt um ósemjurnar, tí tað nógva í skjølunum er strikað út, soleiðis at tað ikki er lesiligt fyri at fjala útyvir allar persónligar upplýsingar og upplýsingar í trúnaði.